# Sambýlið við Sílá – Samandráttur frá eftirlitinum

Sambýlið við Sílá veitir bú- og umlætting til fólk við seinheilaskaða, autismu og sálarligum avbjóðingum. Starvsfólkini arbeiða við persónligari ráðgeving og námsfrøðiligari vegleiðing til borgararnar fyri at tryggja, at tey fáa eitt virðiligt lív við sterkum sosialum tilknýti. Rúmligheit og viðurkenning verða raðfest høgt, og dentur verður lagdur á at tryggja, at borgarar hava mest møguliga ávirkan á egið lív.

**Ætlan og virkisætlan**
Ætlanir eru væl grundaðar, men enn eru virkisætlanir ikki gjørdar fyri allar borgarar. Virkisætlanir verða gjørdar við støði í persónligum málum og námsfrøðiligum tilgongdum, sum skulu tryggja trivnað og menning hjá hvørjum einstøkum.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Arbeiðshættirnir byggja m.a. á KRAP, sosialnámsfrøði og heilsurøkt, sum stuðla jaligum menniskjasýni. Starvsfólk arbeiða miðvíst við at styrkja sosiala inklusjón og at skapa eitt umhvørvi, har borgarar bæði trívast og kenna seg sum part av felagsskapinum.

**Trivnaður og menning hjá borgarum**
Húsfólkini við Sílá trívast væl og hava ein tryggan og innihaldsríkan gerandisdag. Húsfólkini hava jalig sambond við bæði starvsfólk og hvønn annan, og teirra førleikar verða mentir við støði í nærmasta menningarøki og teirra persónligu ynskjum.

**Fakliga arbeiðið hjá starvsfólkum**
Starvsfólkini á sambýlinum við Sílá hava viðkomandi førleikar og arbeiða miðvíst við at styrkja námsfrøðiliga arbeiðslagið. Samskiftið millum starvsfólk er gott, og tey fáa javnan høvi til at styrkja seg fakliga, við íblástri frá hvørjum øðrum.

**Organisatión og leiðsla**
Leiðslan er væl skipað við greiðum ábyrgdarbýti millum eindarleiðslu og staðbundnari leiðslu. Starvsfólk uppliva eina stuðlandi og nærverandi leiðslu, og gott huglag millum leiðslu og starvsfólk tryggjar, at organisatiónin er samanhangandi og vælvirkandi.

**Tilmælir og áheitanir frá eftirlitinum**
Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Mælt verður til at virkisætlanir verða gjørdar fyri allar borgarar.*

*Mælt verður til, at námsfrøðiligu arbeiðshættirnir vera settir meira í spæl. Somuleiðis er týdningarmikið, at hvørt starvsfólk veit nóg mikið um ein breiðan málbólk: mennigartarn, seinheilaskaða, autismu og sálarligar avbjóðingar.*

*Málbólkurin er sera blandaður, og skotið verður upp, at mann ger ein banka við videofyrilestrum, sum kann virka sum eyka kunning til starvsfólk um t.d. ymsar sálarligar avbjóðingar, ymisk aspekt innan menningartarn og ymisk aspekt innan autismu. Ein slíkur videofyrilestrarbanki kann eisini nýtast aðrastaðni í Almannaverkinum, har smá bútilboð fevna um nógvar málbólkar.*

*Mælt verður til at fáa sett upp ábyrgdarbýti millum leiðaraábyrgd og starvsfólkaábyrgd.*

**Viðmerkingar frá Almannaverkinum**
Arbeiðið at gera virkisætlanir til allar borgarar er byrja, og arbeiðs- og háttaløg koma so við og við. Arbeitt fer at vera við ábyrgdarbýtinum, so skjótt sum sambýlið er komi uppá pláss.

*Eingin áheitan verður givið um, at nakað er kritiskt og má fáast í rættlag beinanvegin.*